# Vinna tjúkt upp á breyð

Matvøruprísurin dalar, og kornprísurin fellur støðugt. Hóast hetta hækkar prísurin á breyði í Danmark. Tað er ikki tí at breyð verður seinni ávirkað í mun til aðrar vørur. Bara tann seinasta mánaði er prísurin á breyði hækkaður við einum prosenti, samstundis sum aðrar matvørur er falnar við einum prosenti, vísa nýggjar útrokningar frá Fødevareøkonomisk Institut. Búskaparfrøðingur Martin Salomon úr Brúkararáðnum undrast. Hóast Danmark sjálvt framleiðir eina rúgvu av korni, hava tey teir hægstu breyðprísirnar í ES. – Vit burdu ikki verið tey dýrastu í ES. Tað er ein kappingartrupulleiki, og tað er nakað, politikararnir mugu kanna. Tað einasta, brúkarin kann gera, er at hyggja eftir bíligastu prísunum. Tað kann vónandi leggja trýst á framleiðararnar til at seta teirra órímila høgu prísir niður, sigur hann við Ekstra Blaðið.






*Eitt ørindi hjá avhaldsmanninum, Rasmus Effersøe, er á baksíðuni á fløskuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Dupultmoralsk rúsdrekkalóg

**Erling Eidesgaard, ið er annar av monnunum aftanfyri Dism, metir, at føroyska rúsdrekkalógin bæði kostnaðarmikil og dupultmoralsk**

RÚSDREKKA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað hevur í longri tíð verði eitt kjak, hvørt rúsdrekkalógin í Føroyum er tíðarhóskandi. Hetta hevur Erling Eidesgaard eina greiða meining um.

- Rúdrekkalógin grensar ímóti at vera dupultmoralsk. Vit kunnu keypa so nógv av tí, vit hava hug til, men at bryggja nakað sterkari enn øl sleppa vit ikki. Tað eru nokk ongar orsøkir enn tær religiøsu aftanfyri. Sjálvandi skulu fólk sleppa at meina, at tað er skeivt at bryggja, men tað sýnist bara so skeivt, at drekka útlendskan snaps, sigur Erling Eidesgaard. Hann metir tað eisini vera løgi, at eigararnir av hugskotinum mugu í rúsdrekkasølu landsins fyri at kunna keypa sítt egna brennivín.

## Tað fíggjarliga

Sambært Erlingi Eidesgaard er tað eisini ein stórur fíggjarligur missur fyri føroyingar, at alt sterkari enn øl skal innflytast.

- Tað er so spell, at vit skulu flyta so nógvar pengar av landinum. Eg trúgvi hvørki, at føroyingar fara at drekka meira ella minni, um vit sleppa at bryggja sjálvi. Vit drekka í hvussu so er ikki meira øl enn grannalondini, hóast vit kunnu bryggja tað, fortelur Erling Eidesgaard. Hann leggur afturat, at um tvey ár verður kanska talan um 20 arbeiðspláss, ið koma at liggja uttanfyri Føroyar í samband við Dism, og at tað metir hann vera óheppi.

- Tað skuldi heldur ikki veri nakar trupulleiki at bryggja sterkt í Føroyum. Vit hava nokk av góðum vatni, og føroyski búskapurin kundi eisini fingið eitt íkast. Kanska ikki so stórt at byrja við, men vit liggja so fjarskotið, at tað kundi gott veri ein eksklusiv vøra. Tað er ikki hvønn dag fólk sleppa at drekka brennivín mitt úr Atlantshavinum, metir annar av monnunum aftanfyri Dism.

# Frederik fingið kapping

**Frederik úr Nólsoy hevur fingið kapping. Brennivínshúsið, Dism, er í dag komi við einum nýggjum snapsi. Talan er um eitt føroyskt akvavitt, sum minnir eitt sindur um Aalborg, ið tey flestu kenna. Tó er tað so, at snapsurin verður bryggjaður á Bornholm í Danmark**

RÚSDREKKA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Í morgun varð eitt nýtt føroyskt akvavitt lagt fram, men tað verður bryggjað í Danmark. Stigtakarar eru: Erling Eidesgaard og Mortan Mortensen*

*Mynd: Jens kristian Vang*

Nú er tað ikki bert ólógligt heimabryggja brennivín, ið kann vera føroyskt. Hóast hesin drykkur verður gjørdur uttanlands, so er uppskriftin føroysk og fólkið aftanfyri eisini.

Fløskan, ið varð lagd fram í gamla reinsarínum í Tórsgøtu í morgun, verður kallað Lívsins Vatn. Menninir aftanfyri, Mortan Mols Mortensen og Erling Eidesgaard, hava enntá tikið sær frælsiatskrivatjóðardrykkur føroyinga á fløskuna.

- Vit hava arbeitt við hesi ætlan í hálvtannað ár. Talan er um ein snaps, ið vónandi kemur at taka plássið hjá Aalborg akvavit í føroysku veitslunum. Vit hava eina sterka veitslumentan, og eru nokk millum fólkasløgini, ið drekka mest akvavitt í heiminum, so vit halda tað vera uppá sítt pláss, at hava ein føroyskan snaps, greiðir Erling Eidesgaard frá.

## Uppskriftin

Hóast snapsurin verður bryggjaður í Danmark, meta eigararnir av fyritøkuni, at hann er serføroyskur.

- Tað eru mangir góðir føroyingar, ið eru byrjaðir sum útisetar. Alt aftanfyri, bæði smakkipanel, uppskriftin og fólkini annars eru føroysk, og tí er snapsurin føroyskur, sigur Erling Eidesgaard.

## Smakkurin

Vanliga drekka føroyingar nógvan snaps til veitslur, og nógv snerkja at akvavittinum. Hetta ynskir Dism, ið eisini er eitt lítið gamalt føroyskt mát, at broyta.

- Vit hava roynt at gera eina mildari og meira moderníaða útgávu av akvavitti. Hinir snapsarnir vit vanliga drekka hava ein sera sterkan eftirsmakk, og hann vildu vit minka um. Eisini eru hinir rættiliga gamlar uppskriftir og tí kann tað vera, at tað er tørvur á eini broyting, sigur Mortan Mortensen.

Dism vísir eisini á, at teir hava roynt at menna ein snaps, ið hóskar til føroyska matin.

## Avhaldsmann á baksíðuni

Á etikkettuni á baksíðuni á fløskuni, stendur eitt ørindi úr »Føroyingar, sum her nú koma saman«, ið Rasmus Effersøe hevur skrivað, men tað er ikki í provokatión, at tað stendur á.

- Eg visti ikki av, at hann var íðin avhaldsmaður, men hann má hava upplivað mangt gildi. Hann stendur jú á vaglinum, millum nógv fólk, ið hava drukkið, so eg rokni við at hann yvirlivir tað, sigur Erling Eidesgaard. Hann leggur afturat, at teir fáa meira og meira at vita, tí teir hava eisini fingið upplýst, at har fløskan var lagd fram, er eitt gamalt stað, har anonymir alkoholkarar plagdu at møtast.

## Ein av fleiri

Sum skilst, er ætlanin hjá Dism, at gerast eitt brennivínshús, við nógvum ymiskum snapsum.

- Vit hava ætlanir um at bryggja fleiri ymiskar, men vit vilja enn ikki koma ordiliga koma inná, hvat talan er um. Men mann kann vænta, at okkurt nýtt kemur út í 2009, fortelur Erling Eidesgaard. Hann leggur afturat, at ætlanin er at koma inn á fleiri útlendskar marknaðir.

- Vit fara at royna at koma inn á danska og íslendska marknaðin sum skjótast, men mann kann rokna við, at vit fara at royna at koma inn á amerikanska marknaðin, tí millum amerikumenn, ið stava úr Norðurlondum, er akvavitt populert, sigur Erling Eidesgaard.